Á Toll- og Skattstovu Føroya, Eysturoyar Øki, er starv leyst at søkja til setan skjótast til ber.

Álíkningar-/eftirlitsarbeiði og málsviðgerð innan meirviðisgjald, toll, skatt, innkrevjing o.a., herundir at geva ummælir í møguligum kærumálum. Arbeiðið er rættuliga sjálvstøðugt, tá tann ið settur verður, skal kunna taka sjálvstøðugar avgerðir.

Tann, sum verður settur, skal hava roknskaparligan førleika. Umsøkjarar við roknskaparligari útbúgving hava fyrimun. Viðkomandi, ið settur verður, skal hava vilja til at luttaka í teimum útbúgvingarmøguleikum, sum Toll- og Skattstovan bjóðar, bæði á stovninum og uttanfyri stovnin eitt nú á Handilsskúla v.m., og taka lut í teimum skeiðum, sum stovnurin fyriskipar. Viðkomandi skal vera arbeiðssamur og fyrikomandi, og skal kunna arbeiða sjávlstøðugt.

eitt spennandi starv við nógvum avbjóðingum, sum samstundis eisini er fakliga krevjandi og við møguleikum fyri eftirútbúgving. Eitt sjálvstøðugt starv í góðum arbeiðsumhvørvi, við flex-tíð.

Løn- og setanarviðurskiftir, sum eru treytað av starvsroyndum og útbúgving, eru eftir sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og avvarðandi yrkisfelag.

Setanarøkið fevnir um aðalstýrini, løgmansskrivstovuna og deildir hennara og tann, sum settur verður, skal kunna røkja tænastu á hesum søtðum, um tað verður kravt.

kann fáast við at seta seg í samband við Ingolf Lamhauge, økisstjóra á tlf. 448588.

Skrivlig umsókn saman við avritum av prógvum, ummælum og upplýsingum um starvsroyndir, skal sendast til

Esyturoyar Øki
Postboks 225
Heiðavegur, FO-600 Saltangará

Toll- og Skattstova Føroya er stovnur undir Fíggjarmálastýrinum, hvørs uppgáva er at fyrisita toll-, avgjalds-, mvg-, inntøkuskattalógina og alla skuldarinnkrevjing hjá landinum. Stovnurin hevur 150 starvsfólk og er skipaður soleiðis, at planlegging og menning fer fram í Stýrinum á Argjum. Tær seks økisskrivstovurnar, ið eru á Tvøroyri, í Skopun, Sørvági, Saltangará, Klaksvík og í Tórshavn, røkja raksturin. Í Eysturoyar Øki, har viðkomandi kemur at starvast, starvast 18 fólk.


# ÚTBERARAR Í VÁGI

**Søkt verður eftir fólki at bera bløð út í Vági**

**Áhugað ringið tlf. 211201 millum kl. 9 og 17 ella sendið fax til 341201**

Prentmiðstøðin

**Smyrilsvegur 13 - Postboks 3019, 110 Tórshavn**

– Dimmalætting tlf. 341200 –



GEVIÐ BLÓÐ


Ársaðalfundurin verður í hølum Húsmøðrafelagsins í Bøgøtu hóskvøldið 6. sept. kl. 19.30.

Løgtingsumboð, starvsnevnd og umboð fyri SU vera við á fundinum.


Peugeot 106 1.5 XND
. 1997
85.840

Bilurin verður seldur sum hann stendur nú.

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR
Heri Weihe
tlf. 345600 – lokal 729
fax nr. 345607
at hitta millum kl. 8⁰⁰-10⁰⁰



Daewoo Nubira 2,0 st.car
. 2000
18.318

Bilurin verður seldur sum hann stendur nú.

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR
Heri Weihe, sýnsmaður
tlf. 345729
fax nr. 345607
at hitta mánadag–hósdag millum kl. 08⁰⁰–10⁰⁰
og fríggjadag kl. 08⁰⁰–16⁰⁰



Mazda 323 2.0 D Sedan - 5 gear, 4 hurðar
. 1998
60.475

Bilurin verður seldur sum hann stendur nú.

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR
Heri Weihe, sýnsmaður
t-post: hw@trygging.fo
tlf. 345729
fax nr. 345607
at hitta mánadag–hósdag millum kl. 08⁰⁰–10⁰⁰
og fríggjadag kl. 08⁰⁰–16⁰⁰




Í Býin

# Kinesiskt gamaní



**Ein máltíð á Nantong, á middegi ella á kvøldi, er avgjørt at viðmæla**

Í BÝIN
*Turið Kjølbro*

Situr tú við vindeygað í hugnaligu hølunum í Havnar Klubba við Tinghúsvegin, har matstovan Nantong heldur til, er útsýnið gott. Frálíkt er mest sum ov nógv sagt, tí í løtuni er umbyggingin av bygninginum hjá Føroya Tele til løgtingshús ikki serliga vøkur sjón. Tú sært brotnar betongveggir og burturkast. Tá ið øll henda byggingin er av, sær alt ivaleyst øðrvísi og glæsiligari út.

Innan er Nantong innrættað sum ein kinesisk matstova eigur at vera. Myndir á vegginum, innbúgv, borðbúnaður, prýði og annað eru alt kinesiskt. Litirnir eru djúpt reyðir og heitir, kanska nakað myrkir, men hugnaligt er kortini. Hetta er alt sum tú kanst ímynda tær eina kinverska matstovu at vera aðrastaðni.

Í eina tíð hevur Nantong havt buffé ella sjálvtøkuborð á middegi hvønn dag. Sum skilst leita nógv fólk inn á gólvið og onnur bíleggja mat heim ella á arbeiðsplássið. Á sjálvtøkuborðinum kanst tú velja millum alskyns rættir. Har er toskur í søtari chilisós, pylsur í tomatsós, oksakjøt í ostrasós, høgnarungi í karrysós og kjøtfrikadellur í súrsøtari soyasós. Umframt financial tú várrullur og salat og afturvið fært tú rís og tjips. Úrvalið er gott, onkur av hesum rættunum er rættiliga sterkur og nógv kryddaður, men tað kemur ikki óvart á nakran, tá ið etið verður kinesiskt. Kanska kundi úrvalið verið eitt sindur fjølbroyttari, og til børn er saknur á einum og hvørjum, sum ikki er so kryddað. Eitt gott hugskot kundi eisini verið at havt skelti á borðinum, sum sigur hvat tað er fyri matur, borðreitt verður við. Tað er altíð gott at vita, hvat tú etur.

Tænastan er góð. Tænararnir eru fyrikomandi og skjótir.

Sjálvtøkuborðið er á middegi yrkadagar uttan mánadag frá kl. 11.30 til 14.00. Tá verða dyrnar stongdar, men fólk kunnu sita til kl. 15.00. Síðani verður latið upp aftur kl. 17.00 og opið er til kl. 23.00. Matskráin um kvøldið er rættiliga nógv fjølbroyttari og skalt tú eta kinesiskt um vikuskiftið, er best um tú bíleggur borð.

Tað eru tey bæði Linda Fossdal Guttesen og maður hennara Xiaobin Zhang, ið er kinesari, sum eiga og reka matstovuna Nantong. Tey byrjaðu á vári fyri tveimum og einum hálvum ári síðani og lata væl at undirtøkuni.

Í dag eru nógvar matstovur at velja ímillum í miðbýnum í Havn. Ein máltíð á Nantong, á middegi ella á kvøldi, er avgjørt at viðmæla.






petur & petur • 320870

fríggjakvøldið ■ Discoteque
Ladies Night
Flemming úr DK

leygarkvøldið ■ Discoteque
Flemming úr DK

20 ára aldursmark

PLATFORM
d i s c o t e q u e


Í BÝIN